*»Fólkið kring liðið hevur ikki tosað um annað hendan seinasta mánaðin, so vit kunnu illa ignorera tann møguleikan, sum vit hava«*

*Ronnie Samuelsen, EB/Streymur, um FM-møguleikan hjá liðnum*

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

# ÍTRÓTTUR

Føroyar U17 – Noreg 0-5 (0-4)

# Føroyingar úrlatnir av norðmonnum



*Føroyar taptu ruddiliga fyri Noreg í dystinum um sjeynda plássið leygardagin*

## FAKTA

**Føroyar U17 – Noreg 0-5 (0-4)**

**0-1:** Anders Konradsen, 6.
**0-2:** Kenneth Jensen, 11.
**0-3:** Kristian Brix, 22.
**0-4:** Kenneth Jensen, 40.
**0-5:** Kenneth Jensen, 53.
**Føroyar:** Petur M. Magnussen – Uni H. Johannesen, Heri H. Nesá, Rógvi S. Holm, Viljormur H. Davidsen – Erland Berg Danielsen, Gunnleif Olsen, Heini Vatnsdal, Erling Jacobsen – Páll Klettskarð, Klæmint A. Olsen.
**Eykaleikarar:** Hans Jørgensen, Sámal Jákup Djurhuus Andrias Ellingsgaard, Eli Simonsen, Jóhan Símin Edmundson, André Olsen, Gunnar Thomsen.
**Venjari:** Pætur Clementsen
**Dómarar:** Sævar Jonsson, Andrias P. Hansen og Laurits í Króki

**Tað kom ongantíð spenningur í dystin millum Føroyar og Noreg í Gundadali leygardagin. Dysturin um sjeynda plássið varð ein maktstaðfesting frá norðmonnum um, at teir ikki áttu at enda aftast í kappingini**

NM-KAPPING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Úrslitið sigur rættiliga nógv um dystin og dystargongdina. Norðmenn vóru so ruddilgia oman á alla tíðina, og endaligi málmunurin upp á 5-0 er ikki ov nógv.

Føroyska U19 landsliðið vann annars 1-0 á Noreg í bólkaspælinum, men tann sigurin kundi væl verið nógv størri, men neyvleikin vantaði og tí gjørdist sigurin ikki størri enn tað sama.

Í tí dystinum var norska liðið langt frá sannførandi, og við tí í huganum, at Noreg var einasta stigaleysa liðið í bólkaspælinum, vóru vónirnar til eitt hampiligt úrslit avgjørt til staðar.

### Tvey eins mál

Tað vóru ikki meiri enn seks minuttir spæeldir, tá norðmenn struku fram um. Ein bóltur varð skotin hart og flatt inn í brotsteigin, og sá hann út til at raka fleiri bein á vegnum, áðrenn Anders Konradsen beindi hann í málið.

Fimm minuttir seinni hendi akkurát tað sama. Bólturin kom inn í brotsteigin í vinstru síðu, men verjan fær ikki fótin á og so er Kenneth Jensen framvið fyri fyrstu ferð í dystinum, og leggur norðmenn á odda 2-0.

Hesi bæði málini góvu norðmonnunum veruligt sjálvsálit, meðan føroyingarnir nú vórðu ráðaleysir og vistu ikki hvat var til ráða at taka. Enn vóru ikki meiri enn ellivu minuttir spældir, og teir vóru aftan fyri 2-0.

Lítið broyttist tó næstu løtuna og tá fyrri hálvleikur var hálvrunnin skoraði Noreg til 3-0. Hesaferð at málskjúttin Kristian Brix – ein maður, sum við sínum ótrúligaskjótleika, voldi føroysku verjuni stórar trupulleikar allan dystin á tamb.

Leiðslan upp á trý mál sá út til at verða hálvleiksstøðan, men inni í yvirtíðini sendu norðmenn eitt kanónskot avstað úr 25 metrum. Petur M. Magnussen í málinum var knappur og veittraði harða skotið upp á tvørtræið. Ein sera flott bjarging, men tíverri datt bólturin niður fyri føturnar á Kenneth Jensen, og hóast Petur M. Magnussen var um at fáa fatur á skotinum frá Kenneth Jensen, so eydnaðist tað norðmanninum at fáa bóltin í netið.

Eitt lítið korter inn í seinna hálvleik kom seinasta málið í dystinum. Bólturin varð spældur upp í vinstru síðu. Síðani varð hann spældur tvørtur um vøllin til Anders Konradsen, sum driblar seg leysan og roynir seg úr spískum. Málverjin fær vart fyri skotinum í fyrstu atløgu, men so er tað, at Kenneth Jensen er framvið og hjá honum er lætt at leggja returin í netið.

### Einasta stórtapi

Soleiðis endaði seinasti dysturin hjá U17-landsliðnum við einum veruligum stórtapi. Størsti málmunurin undanfarnu dystirnar var trý mál, men leygardagin skrædnaði so hjá føroyingunum.

Hinvegin kunnu vit aftan á kappingina staðfesta, at fyri nøkrum árum síðani endaði meginparturin av dystunum hjá Føroyum í eini slíkari kapping við einum úrsliti sum hesum, men at tað nú er sera langt í millum tey heilt stóru tapini.

Leikararnir á U17-liðnum skulu tó als ikki smæðast yvir sítt avrik. Teir spældu eina fína kapping, og sigurin móti Íslandi er eitt sera flott úrslit.

Danmark NM-meistari:

## Munurin var Christian Lund Gytkjær

Danmark vann NM-kappingina fyri U17-landslið. Tað gjørdist greitt eftir at Danmark og Ongland høvdu leikt finaluna leygardagin.

Danmark vann dystin onki minnni enn 4-0. Stóri maðurin aftan fyri sigurin eitur Christian Lund Gytkjær, og leikar hann dagliga fyri Lyngby. Christian Lund Gytkjær skeyt eitt reint hattrick í fyrra hálvleiki, tá hann hevði lagt bóltin í netið tríggjar ferðir upp á ein hálvan tíma.

3-0 var eisini hálvleiksstøðan, og tá var tað ógvuliga trupult hjá onglendingum at koma inn í aftur dystin.

Tað komu teir heldur ongantíð, tí tá tíggju minuttir vóru eftir at leika skoraði Thomas Juel-Nielsen til endaliga úrslitið 4-0.

Onglendingar fingu tó síðsta orðið í dystinum, tí Leicester-leikarin Joseph Mattock varð rikin av vøllinum fýra minuttir fyri leiklok.

Harvið taptu onglendingar so ruddiliga fyri Danmark, sum føroyska U17 –landsliðið annars var um at leika javnt ímóti í fyrsta dysti teirra í kappingini, sum endaði 1-0 til Danmark.

**-rwd**

## Finnar fingu triðja plássið

Dystin um triðja plássið vunnu finnar 2-1. Tað vóru annars sviar, sum løgdu seg á odda, tá dysturin var hálvrunnin við máli frá Marcus Tørnstrand. Men við tveimum málum frá Teemu Pukki tryggjaði Finnland sær sigurin móti grannatjóðini.

Fyrra málið hjá finnlendingum kom, tá tjúgu minuttir vóru eftir at leika, og tá tíggju minuttir restaðu í av vanligu leiktíðini, skoraðu teir til 2-1.

Finnland vann annars bara ein dyst í innleiðandi bólkaspælinum, og tað var dystin ímóti Føroyum. Annars spældu teir javnt í móti finalistunum Danmark og taptu fyri íslendingum, sum okkara U17-landslið so flott vann á hósdagin í farnu viku.

**-rwd**